SKJA LM-022/2023
Í LM-022/2023

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Staður: Tórshavn 19.10.2023
J. nr (MEGD): **701-8-2023**
J. nr. (Heilsumálaráðið) 23/18533-21

Løgtingið
(Trivnaðartnevndin)
Tinghúsv. 1-3
FO 100 Tórshavn

LM-022/2023: Broyting av løgtingslóg um almannatrygd og tænastur (stuðul til bil broyttur til stuðul til serligan útbúnað)

Uppskotið hjá Almanna- og Mentamálaráðnum merkir, at verandi skipan við stuðli at keypa bil, hjá fólki, sum hava varandi avmarkaðan likamligan ella sálarligan førleika, verður grundleggjandi broytt. Eftir uppskotinum fer ikki at bera til longur at fáa stuðul til vanligan bil; einans stuðul til serútgerð til bili, tá ið tørvur kann staðfestan á hesum og til kassabilar, sum eru serlig akfør, har pláss m.a. er fyri koyristóli.

Uppskotið

Uppskotið skal spara landkassanum 1 millión krónur, men fyri fólk við niðursetum likamligum og sálarligum førleika, sum kunnu koma undir lógina í dag, verður broytingin eitt stórt afturstig.

Ætlanin er at broyta § 26 í løgtingslógini um almannatrygd og tænastur[1], sum í stk. 1 í dag hevur fylgjandi áseting (við okkara undirstriking):

> Stuðul verður veittur til keyp av bili til persón við varandi avmarkaðum likamligum ella sálarligum førleika, ið munandi skerjir møguleikarnar at ferðast, ella ger tað trupult at fáa ella varðveita eitt arbeiði ella eina útbúgving uttan brúk av bili. Stuðulin verður veittur sum eitt rentufrítt lán, sum í mesta lagi er 180.000 kr.

[1] https://logir.fo/Logtingslog/72-fra-25-05-2020-um-almannatrygd-og-taenastur

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100
Tórshavn

Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15

megd@megd.fo

www.megd.fo

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Við lógaruppskotinum fellur stuðulin til bilakeyp fyri hesar bólkar burtur, og í staðin verður bert latin stuðul til serligan útbúnað til bilar, sum fólk við varandi virkistarni kunnu hava fyri neyðini (umframt stuðul til kassabilar, sum er galdandi í dag). Heldur enn at veita stuðul til bil *kann frameftir verða veittur stuðul til serligan útbúnað, sum er neyðugur fyri, at fólk við virkistarni kunnu koyra bil,* sum skrivað stendur í lógaruppskotinum.

Talan verður sostatt um eina ógvuliga avmarkaða tænastu fyri fólk við breki, sammett við tænastuna eftir galdandi lóg.

Ivasamar grundgevingar

Umframt sparingin leggur uppskotið upp til, at talan verður um eina *nútímansgerð* av skipanini, har bert tey, sum veruliga hava tørv á hjálp, fáa hjálp: Tað er hjálpt til *serútbúnaðin í bilinum*, og einki annað. Í uppskotinum verður grundgivið soleiðis (við okkara undirstriking):

> Í mun til grundregluna um endurbót, eigur stuðul bara at verða veittur í mun til tær meirútreiðslur, ið standast av virkistarninum, og ikki fyri tær útreiðslur, ið viðkomandi persónur annars hevði havt. *Ein persónbilur er í dag at meta sum ein vanligur brúkslutur, ið nógv hava ella hava góðan møguleika at ogna sær.* Hetta verður endurspeglað í stuðlinum soleiðis, at endurbót ikki verður veitt til bilin sjálvan sum brúkslut, men heldur tær meirútreiðslur, ið eru neyðugar í mun til virkistarnið og bilin, ið viðkomandi persónur skal hava.

Stuðul til bil verður latin eftir ásetingunum um endurbót í løgtingslógini um almannatrygd og tænastur. Tað ert rætt, at almennu lógarviðmerkingarnar nevna *meirútreiðslur* sum eina umsitingarreglu[2], men lógin inniheldur eisini aðrar týðandi meginreglur, sum skulu haldast í málsviðgerð; meginreglur, sum lýsa sjálvt endamálið við okkara meginlóg á almannaøkinum.

[2] Sbr. løgtingsmál LM-079/2019: Uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, https://www.logting.fo/mal/mal/?id=230

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100
Tórshavn

Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15

megd@megd.fo

www.megd.fo

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Viðvíkjandi reglunum um endurbót leggja almennu lógarviðmerkingarnar upp til, at gerast skal *ein individuella og ítøkilig (heildar)meting av støðuni*. Nakað, sum er í samsvari við fyrisitingarrættin:

> Flest øll tænasta, ið verður veitt persónum, ið bera brek, er at meta sum endurbót. Fíggjarlig endurbót er, tá persónur antin fær fíggjarligan stuðul av ávísum slagi ella fær fíggjarligt endurgjald, og er *endamálið at hjálpa borgarum at liva eitt so sjálvstøðugt lív, sum tilber,og á jøvnum føti við onnur. Fíggjarlig endurbót tekur støði í tørvi og lívsstøðu hjá tí einstaka.*

Løgtingslógin leggur dent á somu grundreglur í endamálsorðingini í teimum almennu lógarviðmerkingunum, har tað framgongur, at lógin hevur til endamáls,

- at veitingar og tænastur skulu *eggja til størri sjálvhjálpni*
- at so nógv sum gjørligt kunnu hava og *varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin*
- at *minka um ójavnan í samfelagnum*
- at veitingar og tænastur skulu hava fyri eyga at *gera borgaran meira sjálvbjargnan*

Fáa vit nú eina skipan, har stuðulin verður avmarkaður til einans at vera fyri tey, sum hava brúk fyri serútgerð í bili, og bert stuðul til serútgerðina, so ganga vit burtur frá eini skipan, har stuðulin skal *taka støði í tørvi og lívsstøðu hjá tí einstaka,* sum kunnu vera fólk við breki, minka um ójavnan í samfelagnum, gera borgaran meira sjálvbjargnan og tryggja tilknýtið til arbeiðsmarknaðin; soleiðis sum endamálið í lógini sigur.

Eru ikki javnsett

Tað tykist sum, at lógaruppskotið í viðmerkingunum leggur upp til, at við uppskotinum verða fólk, sum bera brek javnsett við onnur, tá ið tað umræður at útvega sær ein vanligan bil. Men fólk við niðursettum fysiskum og psykiskum førleikum eru júst **ikki** í somu støðu sum onnur. Tey eru verri fyri.

Tildømis kunnu tað vera *onnur sløg av brekum* enn júst tey likamligu brek, ið kunnu vera endurbøtt við serútbúnað til ein bil, sum gera, at fólk við breki ikki fáa nýtt almennu ferðsluna, men mugu hava bil fyri at koma til og frá arbeiði ella skúla. Hetta eigr – smbrt. lógarviðmerkingunum omanfyri – at vera mett ítøkiliga og individuelt.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100
Tórshavn

Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15

megd@megd.fo

www.megd.fo

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Eisini er tað væl kent, at fólk við breki *hava avmarkingar viðvíkjandi arbeiðs- og inntøkumøguleikum*. Avmarkingar, sum kunnu gera, at tey ikki hava ráð til bilin, sum tey tó hava tørv á fyri at koma aftur og fram til arbeiðis ella skúla, *tí, at inntøkan møguliga er minni enn hjá øðrum*. Nakað, sum í dag kann staðfestast við eini ítøkiligari og individuellari tørvsmeting, sum m.a. er grundað á omanfyrinevndu kriteriir í lógini.

Fólk við breki kunnu hava góðar førleikar og vera gávurík, sum onnur, men eru sum útgangsstøði í eini verri støðu enn onnur orsaka av sínum breki. Tí hava Føroyar bundið seg til Brekarættindasáttmálan hjá ST, sum áleggur myndugleikunum skyldur, at beina burtur tær forðingar – eisini av fíggjarligum slagi – sum gera, at fólk við breki ikki fáa gagnnýtt sína førleikar og síni grundleggjandi mannarættindi, so at tey vera fyri mismuni í samfelagnum.

Hetta er tann positiva skyldan hjá myndugleikunum, at skipa fyri serligum tiltøkum og hjálp innan rímiligt mark, t.d. fíggjarligari hjálp, ið beina munirnar burtur. Og hetta er nakað, sum ein individuell og ítøkilig tørvsmeting, smbrt. lógini um almannatrygd og tænastur, í dag kann vera við til at tryggja.

Tískil ber ikki til at skera øll yvir ein kamb, sum gjørt verður í hesum uppskotinum, og bara uttan víðari javnseta fólk við breki við onnur. Og við hesum lógaruppskoti er vandi fyri, at løgtingið kann koma við til at skapa ein mismun, sum m.a. Brekrættindasáttmálin hjá ST hevur sum eitt av sínum fremstu endamálum at beina burtur.

Vísandi til omanfyrinevnda heitir MEGD á løgtingið um at vísa lógaruppskotinum frá sær og at halda fast verandi lógaráseting í § 26, og sum eru betri í samvari við endamálsorðingina í løgtingslógini um almannatrygd og tænastur og við Brekrættindasáttmálan hjá ST, sum løgtingið hevur bundið Føroyar til at halda.

Vinarliga

MEGD

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100
Tórshavn

Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15

megd@megd.fo

www.megd.fo